**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 108/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin)** (Brotsverk ímóti almennum myndugleikum o.a., brotsverk ímóti almennum friði og skilhaldi, brotsverk í tænastu ella starvi hjá tí almenna o.a., følsk frágreiðing og følsk ákæra, brotsverk viðvíkjandi gjaldsmiðlum og skjalafalsan)

Løgmaður, Aksel V. Johannesen, hevur lagt málið fram 28. februar 2019, og eftir 1. viðgerð 8. mars 2019 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 15., 20. og 29. mars og 3. og 10. apríl 2019.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við løgmann, Aksel V. Johannesen.

Nevndin vísir á, at á heysti 2015 samtykti Løgtingið at heita á landsstýrið um at dagføra og føroyska revsilógina. Hetta er eitt stórt og rættiliga tíðarkrevjandi arbeiði, og dagføringin av revsilógini verður tí býtt sundur í hóskandi partar. Hetta ger tað samstundis møguligt hjá landsstýrinum og Løgtinginum at viðgera dagføringarnar betur og gjøllari bæði málsliga og innihaldsliga. Higartil eru kapitlarnir 24 til og við 29 dagførdir og føroyskaðir.

Eftir ætlan skal arbeiðið at dagføra og føroyska revsilógina verða liðugt í 2021. Í hesum umfarinum eru tað kap. 14 til og við 19, sum eru dagførdir og føroyskaðir, og teir umfata:
Kap. 14: Brotsverk ímóti almennum myndugleika
Kap. 15: Brotsverk ímóti almennum friði og skilhaldi
Kap. 16: Brotsverk í tænstu ella starvi hjá tí almenna
Kap. 17: Følsk frágreiðing og følsk ákæra
Kap. 18: Gjaldsmiðlabrotsverk
Kap. 19: Skjalafalsan

Arbeiðið at føroyska revsilógina verður gjørt í samstarvi við Málráðið, sum vegleiðir í málsligum ivamálum, og Revsirættarliga Ráðið, sum í høvuðsheitum viðger løgfrøðiliga innihaldið og eisini í ávísan mun málið.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Rættarnevndin, 24. apríl 2019**

| | | |
|---|---|---|
| Kristin Michelsen<br>formaður | Magnus Rasmussen | Sonja J. Jógvansdóttir |
| Ruth Vang | Ingolf S. Olsen | Edmund Joensen |

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur